# Væleydnað musikkstevna




*Musikkstevnan 2003 endaði við eini stórari felagsframførslu, har øll luttakandi orkestrini spældu tveir marsjir saman*

**Sjey hornorkestur og eitt harmoniorkestur myndaðu musikkstevnuna 2003, sum varð hildin í Runavík Dýra Biðudag – sjálvan 40 ára dagin hjá vertunum Nes Sóknar Musikkfelag**

MUSIKKSTEVNA
*Solby A. Eliasen*

Marsjir, poppsangir, swing tónleikur, tað meira klassiska og negro spirituals. Tað er nakað av tí, sum var á skránni til musikkstevnuna í Runavík. Konsertin vardi í tríggjar tímar. Hon varð sett av Rodmundi Nielsen, borgarstjóra, klokkan tvey og síðani løgdu vertirnir fyri. Hetta var sum sagt 40 ára dagurin hjá Nes Sóknar Musikkfelag, og nýttu tey høvi til at heiðra nøkrum av limunum, sum høvdu verið longst við. Teir fingu allir heiðursbræv handað frá formanninum, Thorleifi Hansen.

Konsertin gekk fyri seg í ítróttarhøllini í Runavík, og hon var væl fyrireikað. Ein stórur pallur varð gjørdur, har trý orkestur sótu. Og so sat eitt á gólvinum. Hesi fýra løgdu so út í hesi raðfylgju: Vertirnir fyrst undir leiðslu av Kenneth Jones, síðani Sørvágs Tónleikarafelag og Vestmanna Hornorkestur undir leiðslu av Steve Foggin, síðani einasta harmoniorkestrið, GHM og seinast í fyrru hálvu Klaksvíkar Hornorkestur undir leiðslu av Ulf Nordlund. Sum sagt sótu øll fýra orkestrini tilreiðar at spæla á pallinum og gólvinum, hetta stytti nógv um, tí í staðin fyri at orkestrini skiftu so hvørt, so var bert tað eina skiftið í steðginum, tá hini fýra orkestrini settust. Tey vóru Havnar Ungdómsorkestur á gólvinum undir leiðslu av Kenneth Jones og Tvøroyar Hornorkestur undir leiðslu Jens Knudsen, Fuglafjarðar Hornorkestur undir leiðslu Ken McLeod og Havnar Hornorkestur undir leiðslu av Ova Olsen á pallinum.

Tað ber illa til at taka nakað fram um nakað, men nevnast mugu tó gestirnir hjá Klaksvíkar Hornorkestri, sum rættiliga settu dám á konsertina við teirra framúrskarandi framførslu. Dixie eitur bólkurin, og í honum spæla ungir normenn, sum allir ganga á musikkonservatorium. Teir høvdu eina flotta og lívliga solo-framførslu í tí eina stykkinum, sum Klaksvíkar Hornorkestur framførdi, That´s a Plenty. Seinni um kvøldið spældu teir eisini til veitsluna.

Øll orkestrini høvdu umleið fimtan minuttir í part til teirra framførslu, og tað var sera hugaligt at sita sum áhoyrari, tí tað var ongin ivi um, at øll orkestrini høvdu gjørt teirra besta og ítarsta til henda dagin, so at júst teirra framførsla skuldi verða so góð sum til bar. Frásøgumaður var Martin Mouritsen. Alt gekk væl, alt klappaði, og tær tríggjar felagsframførslurnar vóru prikkurin. Í fyrru hálvu spældu tey fýra orkestrini vakra lagið Onki er sum summarkvøld við strendur. Og tað var ikki frítt, at hárini reistust, meðan tónarnir frá teimum mongu spælarunum fyltu alla høllina bæði væl og virðiliga. Í seinnu hálvuni spældu hini fýra orkestrini Dimmið - Nú nemur náttin við smærur. Eisini eitt avbera vakurt lag, sum varð einastandandi væl framført. Og at enda, tá ið Havnar Hornorkestur var liðugt við sína framførslu, spældu øll luttakandi orkestrini tveir marsjir saman. Sons of the Brave og Slaidburn.

Ein avbera væleydnað konsert var komin at enda, og lógvabrestirnir vóru nógvir og harðir. Áhoyrararnir vóru vælnøgdir, og tað lat til, at spælararnir eisini vóru glaðir um konsertina. Einstøk avrik sum felags.

Ljóðgóðskan var í toppi, og at orkestrini vóru so væl fyrireikað gjørdu sítt til, at Musikkstevnan 2003 kann av sonnum sigast at vera ein av teimum bestu.

Seinni um kvøldið varð veitsla hildin í B68 húsinum á Toftum.




*Norsku gestirnir hjá Klaksvíkar Hornorkestri settu rættiligt lív í, tá teir spældu eina solo*




*Musikkstevnan var á 40 ára degnum hjá vertunum, og tey nýttu høvi til at heiðra nøkrum av teirra trúgvastu og drúgvastu limum*



*Fleiri solistar vóru á Musikkstevnuni, og komu teir allir væl frá teirra framførslu*

# ítróttur

Nr. 95 • mikudagur • 21. mai 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Enn ein skaði hjá HB

**Meistararnir úr HB hava longu havt sínar trupulleikar við skaðum, og nú er líkt til, at Kári Nielsen ikki verður tøkur fyrr enn til seinnu kappingarhálvu**



*Kári Nielsen vann sær heilt skjótt eitt pláss á liðnum hjá meistarunum úr HB, men longu í fyrsta dystinum fekk hann álvarsligan skaða, sum helst heldur honum úti alla fyrru kappingarhálvu*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

SKAÐI
*Jákup Mørk*

Kári Nielsen er ein av nýggju monnunum í HB í ár, og ikki kann sigast annað enn, at ungi sandoyingurin hevur staðið seg væl. Hóast harða kapping um miðvallarplássini hevur hann longu verið partur av liðnum í nógvum dystum, og avrik hansara hava alt meira bent tann vegin, at hann skal hava fast pláss á miðvøllinum.

Til fyrsta landskappingardystin var støðan eisini so, at Kári taldist millum teir fyrstu ellivu. Men tíverri kann nú eisini staðfestast, at hesin fyrsti landskappingardyturin fyri nýggja felagið helst eisini verður tann seinasti í fyrstu atløgu.

Beint fyri steðgin var Kári nevnliga so óheppin, at hann breyt eitt bein í fótinum, og so er dómurin frá læknunum eirindaleysur. Seks vikur í gips, áðrenn uppafturvenjing kemur upp á tal.

- Eg skuldi venda mær, men tá eg setti fótin til, kendi eg eitt knekk. Eg havi áður havt líknandi skaða í hinum fótinum, so eg var mest sum vísur í, hvat var hent alt fyri eitt, greiður Kári frá.

- Hetta er at kalla sami skaðin, sum eitt nú Andrew av Fløtum og Hans á Lag hava stríðst við seinnu árini, men um ikki annað, so er tað reint brot hjá mær, meðan tað var brákað hjá teimum, og tað kann ofta taka langa tíð at fáa í rættlag.

Hvussu er og ikki, so verður talan í øllum førum um seks vikur uttan fyri vøllin, og Kári dylur ikki fyri, at hetta kennist svárt.

- Ja, hetta er ræðuliga keðiligt. Ikki minst nú eg meira ella minni var farin at rokna meg sjálvan sum fastan á liðnum, er tað tungt, at fáa ein slíkan skaða. Tað verur so ikki fyrr enn um seks vikur, at gipsið verður tikið av, so tað verður neyvan til nakran dyst hesu megin summarsteðgin.

- Sjálvandi kann eg royna at halda meg í form, meðan beinið framvegis er í gipsi, men tað verður so altíð avmarkað, hvat tú kanst gera í slíkum førum, so eg noyðist helst bara at brynja meg við toli, sigur ein vónbrotin leikari at enda.

# Fýra føroyingar í marathon

**Stóra Copenhagen marathon varð runnin 18. mai, og millum luttakararnar vóru eisini fýra føroyingar**

RENNING
*Jákup Mørk*

Seinasta sunnumorgun fór startskotið til árligu Copenhagen Marathon kappingina. Ein kapping, sum seinnu árini hevur ment seg alt meira, og sum hesaferð taldi yvir 6.000 luttakarar.

Millum allar hesar vóru eisini fýra røroyskir rennarar. Cecil Weihe, Súni Jacobsen, Ólavur Herup Olsen og Jákup-Alberg Berg.

Sagt verður, at umstøðurnar at renna vóru stak góðar. Eini 15 hitastig og eitt lítið lot, soleiðis at sólin ikki darvaði alt ov nógv.

Ikki minst fyri føroysku rennararnar mundi hetta kennast gott, og tað var eisini sjónligt á úrslitunum, at teir høvdu ein góðan dag.

Fyrstur á mál var Cecil Weihe við tíðini 2.49,08. Hetta var nóg mikið at tryggja honum eitt sætta pláss í sínum bólki, og tað má metast sum framúr gott úrslit.

Súni Jacobsen tók lut í sama bólki sum Cecil. Hetta var fyrsta marathonrenningin yvirhøvur fyri hansara viðkomandi, so í sjálvum sær mundi tíðin, 3.29,47, ikki hava sama týdning, sum tað hevði at gjøgnumføra kappingina.

Í aldursbólkinum 40-44 ár tók Jákup-Alberg Berg lut. Hann hevði tíðina 3.55,12, og gav heta honum eitt pláss sum 240 í sínum bólki og 1.896 samanlagt.

Veteranurin á føroyska liðnum var Ólavur Herup Olsen, og hann prógvaði enn einaferð, at hann dugir at renna langar teinar. Tíðin hjá honum var 3.42,57, og í aldursbólkinum 60-64 var hetta nóg mikið til eitt 10. pláss.

## Nærkast egnari kapping

Annars er tíðin av álvara farin at styttast, til fyrsta føroyska marathon-kappingin verður veruleiki.

Hetta verður tann 19. juli í Havn, og úr Bragdinum verður sagt, at tey nú eru komin væl áleiðis í fyrireikingunum til hetta. Krøvini til slíka kapping eru stór, hóast rennararnir kanska ikki eru so nógvir, og í fyrsta umfari er hetta tí eitt slag av próvtøku hjá Bragdinum. Spælir alt væl av, eru vónirnar í øllum førum, at talan næstu árini kann vera um eina veruliga stóra kapping, har tað eisini kann eydnast at fáa útlendskar rennarar við.